

# Býráðsskrivstovan og Suðuroyar Kunningarstova á Tvøroyri um høgtíðina

Í samband við jóla- og nýggjárshøgtíðina verður býráðsskrivstovan og Suðuroyar Kunningarstova á Tvøroyri stongd frá 21. december 2007.

***Opið verður aftur mikudagin 2. januar 2008***

Borgarar, sum hava <u>átrokandi</u> ørindi, kunnu ringja til hesar telefonir:
Eru trupulleikar við vatnveitingini o.tl.:
fartlf: 228221 (vatndeildin)
Er talan um kommunal kloakkviðurskifti v.m:
fartlf: 285085 el. 222910 (vegadeildin)

Mint verður á, at í neyðstøðu sum stendst av áarføri o.t. , kunnu fólk sum altíð ringja 112.

**Avgreiðsla av brævatkvøðum**

Í samband við løgtingsvalið verður opið tórsdagin 27.dec og fríggjadagin 28.dec. frá kl.13.00 - 15.00 har fólk kunnu koma inn og avgreiða bræv-atkvøður.

**Tvøroyrar Kommuna og Suðuroyar Kunningarstova á Tvøroyri**

TVØROYRAR KOMMUNA

# Hallarvørður

**Vegna farloyvi søkir Vágs Ítróttarráð eftir hallarvørði til Ítróttarhøllina í Vági at røkja í fyribils 1 ár.**

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- At røkja høllina og økið uttanum
- At røkja fótbóltsvøllin og økið uttanum
- At gera umvælingar
- At ljós, hiti, luftreinsan og sanitetsviðurskifti eru í lagi
- At halda reint og ruddiligt inni og uttan um høllina
- At gera reint í høllini og felagshølum annars
- At hava ábyrgd av hallarleiguni / hallartímum
- At hava samskifti við tey, ið brúka høllina

**Førleikakrøv:**
Tú skalt duga at arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava góð samstarvsevni

**Starvs-og setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Vágs Ítróttarráð á tlf. 373459

**Umsókn**
Við upplýsing um útbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal sendast til Vágs Ítróttarráð v/ Óli Holm, postsmoga 5, 900 Vágur í seinasta lagi fríggjadagin 4. januar 2008.

MIÐVÁGS KOMMUNA

# Frá Miðvágs kommunu

Søkt verður eftir **reingerðingsfólki til Miðvágs Skúla** at byrja tann 01. februar 2008 ella sum skjótast. Starvið er 12,5 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til umsjónarmannin tlf. 219429 ella kommunuskrivstovuna tlf. 332429.

Umsóknir skulu verða **Miðvágs bygdaráð** í hendi seinast mikudagin 09. januar 2008.

**Miðvágs Kommuna**

# *Frá Stráluni*

*Vit vilja ynskja øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár. Stór tøkk øll tit, ið hava hjálpt og stuðlað okkum í ár*

*Bestu heilsanir*

*Strálan*

Barnagarðurin á Konmansmýru
Hoyvíksvegur 41 b · Tlf. 31-787 · Fax: 31-6076

# PEDAGOGAR

## Vit søkja eftir 3 pedagogum

Søkt verður eftir 3 pedagogum 35 tímar um vikuna, at byrja 1. feb. 2008 ella eftir nærri avtalu.

Á stovuni eru 17 børn í aldrinum 3-6 ár.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
- Trivnaðin
- Opinleika
- Samarbeiði

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi
- At tú heldur tað verða spennandi og mennandi

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið Føroya.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad ella varaleiðaran Eyðvør Jensen. TLF. 317878

Umsókn við avriti av prógvið og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 4. januar 2008 Barnagarðurin á Konmansmýru

**Barnagarðurin á Kommansmýru**

HAVNAR ARBEIÐSMANNAFELAG

# Frá Havnar Arbeiðsmannafelag

Við tøkk fyri árið farna ynskja vit limum við húski og viðskiftafólki eini gleðilig jól og signing Harrans í árinum nýggja

**Nevndin**